

*Frøin var sum verða man stór á Brian Kerr, landsliðsvenjara, tá fyrsta stigið í hesi undankappingini kom til høldar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stórur dagur hjá Kerr

**LANDSLIÐSVENJARIN – Eg veit, at fleiri av írum fegnast um úrslitið, sigur stórsmílandi Brian Kerr**

Uni Holm Johannesen

– Eg ynskti so hjartaliga, at vit fingu stig í dag, og tað er fantastiskt, at tað eydnaðist, er fyrsta viðmerkingin hjá Brian Kerr.

Venjarin úr Írlandi hevur ættarbond í Norðurírlandi, og hann visti, at fleiri í familjuni og vinarskarðanum hugdi at dystinum.

– Tí var tað serliga umráðandi, at eg ikki stóð sum tapari. Hetta úrslitið er sera týdningarmikið fyri meg, sigur Kerr.

### Hetta var møguleikin

Brian Kerr er fegin um, at Føroyar fingu stig í einum av teimum fýra dystunum, sum eru spældir í undankappingini í ár.

– Málið var í øllum førum at fáa eitt stig. Vit kundu havt tvey, ella fýra stig, um vit hildu tørn í Estlandi, sum var mín ræðuligasta fótbóltsuppliving nakrantíð. Men vit rukku minsta málinum, og tað eri eg nøgdur við, sigur Brian Kerr, sum greiddi spælarunum frá undan dystinum, at líkindi vóru stór fyri, at teir fingu stig, um teir komu væl frá uppgávuni.

Landsliðsvenjarin er serliga fegin um avrikið hjá føroyingunum.

– Leikliga eru vit væl við. Vit stríðast veruliga fyri tí, og vit prógva, at um tú gevur alt, sum tú eigur, so kemur tú eisini langt, sigur landsliðsvenjarin.



*Brian Kerr var meiri prátingarsamur enn norðurírskí starvsfelagin aftaná dystin í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**BÓLKUR A:**
Belgia – Eysturríki ....... 4-4
Kasaksthan – Týskland ... 0-3
Aserbadjan – Turkaland... 1-0

**BÓLKUR B:**
Slovakia – Írland......... 1-1
Makedonia – Russland.... 0-1
Armenia – Andorra....... 4-0

**BÓLKUR C:**
Estland – Slovenia ....... 0-1
Føroyar – Norðurírland ... 1-1

**BÓLKUR D:**
Frakland – Luksemburg... 2-0
Hvítarussland – Albania .. 2-0

**BÓLKUR E:**
Holland – Svøríki ........ 4-1
San Marino – Moldova .... 0-2
Finnland – Ungarn ....... 1-2

**BÓLKUR F:**
Grikkaland – Ísrael....... 2-1
Lettland – Georgia ....... 1-1

**BÓLKUR G:**
England – Montenegro ... 0-0
Sveis – Wales ........... 4-1

**BÓLKUR H:**
Ísland – Portugal ........ 1-3
Danmark – Kýpros ....... 2-0

**BÓLKUR I:**
Skotland – Spania ....... 2-3
Liktinstein – Kekkia...... 0-2

**EM undankapping Bólkur C**

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Italia | 3 | 2 | 1 | 0 | 7 | 1 | 6 | 7 |
| 2 | Slovenia | 4 | 2 | 1 | 1 | 7 | 3 | 4 | 7 |
| 3 | Estland | 4 | 2 | 0 | 2 | 6 | 5 | 1 | 6 |
| 4 | Norður Írland | 3 | 1 | 2 | 0 | 2 | 1 | 1 | 5 |
| 5 | Serbia | 3 | 1 | 1 | 1 | 5 | 4 | 1 | 4 |
| 6 | Føroyar | 5 | 0 | 1 | 4 | 3 | 16 | -13 | 1 |

# Atli fekk tamarhald á Lafferty

**VERJA Kyle Lafferty var ein støðug hóttan, men Atli Gregersen fekk tamarhald á framherjanum í seinna hálvleiki**

Uni Holm Johannesen

Atli Gregersen greiddi sína uppgávu til lítar í gjár, tá miðverjin ferð aftaná ferð noyddist í luftdystir við norðurírsku mótstøðumenninar.

Í fyrra hálvleiki tapti hann hinvegin fleiri nærdystir móti Kyle Lafferty, men føroyingurin stóð seg betur í seinna hálvleiki.

– Eg lærdi í fyrra hálvleiki, at eg hoppaði ov tíðliga, og tí varð eg oftast ov stuttur. Eg spældi meg upp, sum tíðin gekk, og var oftast fyrstur á bóltinum í seinna hálvleiki, sigur Atli Gregersen, sum staðfestir, at hansara leiklutur passaði honum væl.

Lafferty javnaði fyri Norðurírland í gjár. Framherjin sneiddi fýra føroyingar av, áðrenn hann sendi bóltin avstað. Umvegis stólpan tryggjaði hann norðurírum eitt stig.

Fróði Benjaminsen, liðskipari, harmast.

– Vit skuldu fingið bóltin av Lafferty, og tað er keðiligt, at vit ikki fáa steðga honum. Men hinvegin, teir høvdu fleiri upplagdar møguleikar, sum teir ikki fingu mál uppá, vísir Fróði Benjaminsen á.

Kyle Lafferty var mest eyðsýndi norðurírin í gjár. Hann hótti støðugt føroysku verjuna.

uni@sosialurin.fo

# Lítil virðing fyri føroyingum í Danmark

Christian Høgni Jacobsen, Jónas Tór Næs, Bogi Løkin og Andreas Lava Olsen eru millum føroyingarnar, sum hava roynt seg í næstbestu deildini í Danmark seinastu árini. Teir hava ikki sannført venjararnar um, at teir hava uppiborið pláss í byrjunaruppstillingini.

Brian Kerr segði ikki skilja støðuna á tíðindafundinum á Hotel Føroyum undan dystinum.

– Tað er ikki tí, at teir hava uppiborið tað. Eg hugsi, at danir hava ikki stórvegis virðing fyri føroyingum, og tí skulu føroyingar vísa nógv meira enn danir, sigur Brian Kerr.

Landsliðsvenjarin ynskir, at fleiri føroyskir fótbóltsspælarar fara uttanlands at spæla.

Hann vísir á, at tað er neyðugt, at føroyskir landsliðsleikarar spæla á hægri støði, um landsliðið skal fáa betri úrslit.

– Flestu spælararnir spæla í føroysku kappingini, og Vodafonedeildin er altso ikki millum seks tær bestu fótbóltskappingarnar í heiminum, skemtaði Brian Kerr.

Hann segði, at samfullir norðurírskir landsliðsleikarar, sum vitjaðu á Svangaskarði í gjár, spæla uttanlands – í Skotlandi og Onglandi.

– Hugsið tykkum, at teir spæla spældur í heimligu kappingini í Norðurírlandi. Landsliðið hevði ikki staðið seg eins væl, segði Brian Kerr.

uni@sosialurin.fo